betri
DEILDIN

# LEIKSKRÁ

12. APRÍL 2023

SKRÁ NR. 4




JHON MENA NR. 9

EB/STREYMUR
SAMAN STANDA VIT STERK
1993

# 2. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo


PORTAL.FO

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar


Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo



**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen



betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
betri
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM EB/Streymur

Dómarar

Toppskjúttar eftir 3 umfør

Søgubrot 1

ÍF-sangurin




INTERSPORT
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot



TEKST: **BIRGIR PETERSEN**

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til dyst í Betri-deildini. Í dag verður umfarið, sum upprunaliga skuldi leikast 11. mars avgreitt. Tá var ikki leikandi vegna vánaligt veður og frost. Seinasta umfar leiktu vit eisini heima, tá vóru Víkingar á vitjan og tóku øll 3 stigini við sær út um Varmakeldueiði. Hetta var ein sera ringur biti at svølgja, tí teir fingu skora í evstu løtu av dystinum, sum endaði 0-1. Okkara lið er styrkismett munandi veikari enn teirra, so okkara útgangsstøði lá á tann verjukenda bógvin, og síðan at taka av møguleikanum um hann kom. Sigast skal at okkara menn gjørdu alt eftir bókini, og hugburðurin var góður og allir bardust av øllum alvi. Vit kunnu ugga okkum við at tað er sera tungt at fóta sær eftir uppflyting, men at vit við hetta lag nokk skulu fáa gongd á aftur.

Í dag taka vit ímóti EB/Streymi, sum eru komnir væl í gongd í kappingini, og fingu sín fyrsta sigur í hús úti í Hólmanum á Eiði leygardagin móti TB. Teir hava fingið venjaran Sigfríða Clementsen at standa á odda fyri liðinum, og er hann ein garvaður innan fakið og er sera dugnaligur taktikari.

Í dag verður spennandi at síggja hvussu dysturin fer at verða leiktur, bæði liðini noyðast at leggja nógv fyri, tí okkara lið dystast lið um lið um at koma uppeftir stigatalvuni.

Nú er so stutt millum dystirnar, men hóast hetta, so eru allir mans tøkir aftur í dag.

Góðan dyst øll somul.
**Koyri á drongir**




**BÓLTASTUÐUL:**
Fuglafjarðar Havn



VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

## EFTIR 3 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 3 | 3 | 0 | 0 | 11 | 2 | +9 | 9 |
| 2 | HB | 3 | 3 | 0 | 0 | 10 | 1 | +9 | 9 |
| 3 | Víkingur | 3 | 2 | 0 | 1 | 8 | 3 | +5 | 6 |
| 4 | B36 | 3 | 2 | 0 | 1 | 5 | 2 | +3 | 6 |
| 5 | EB/Streymur | 3 | 2 | 0 | 1 | 4 | 2 | +2 | 6 |
| 6 | 07 Vestur | 3 | 1 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 7 | ÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 8 | B68 | 3 | 0 | 1 | 2 | 2 | 7 | -5 | 1 |
| 9 | AB | 3 | 0 | 0 | 3 | 0 | 8 | -8 | 0 |
| 10 | TB | 3 | 0 | 0 | 3 | 2 | 16 | -14 | 0 |

WWW.DYSTIR.FO

## 2. UMFAR

| | |
|---|---|
| 12.04.23 | ÍF - EB/Streymur |
| 12.04.23 | AB - KÍ |
| 12.04.23 | B36 - 07 Vestur |
| 12.04.23 | TB - HB |
| 12.04.23 | B68 - Víkingur |

## 6. UMFAR

| | |
|---|---|
| 16.04.23 | B68 - EB/Streymur |
| 16.04.23 | HB - ÍF |
| 16.04.23 | AB - B36 |
| 16.04.23 | KÍ - Víkingur |
| 16.04.23 | TB - 07 Vestur |

# KES.FO

HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| uben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

INNIHALD

| | |
|---|---|
| Jóanes **E. Davidsen** | 1 |
| Ólavur **Niclassen** | 2 |
| Árni **G. Olsen** | 3 |
| Elias G. **El Moustage** | 4 |
| Mikkjal **Hellisá** | 5 |
| Dánjal **Godtfred** | 6 |
| Rógvi **Egilstoft** | 7 |
| Tóki **Johannesen** | 9 |
| Bogi **Reinert-Petersen** | 10 |
| Markus **Hellisdal** | 15 |
| Fayo J. **K. Kruse** | 16 |
| Niels Pauli **Danielsen** | 17 |

| | |
|---|---|
| Rani **Hansen** | 18 |
| Filip **K. Johansen** | 19 |
| Virgar **Jónsson** | 20 |
| Hans Pauli **á Bø** | 21 |
| Sverri **Mariusarson** | 23 |
| Jákup **Hummeland** | 24 |
| Andras **Olsen** | 26 |
| Bergur **J. Poulsen** | 30 |
| Arnar **Dam** | 31 |
| Gutti **Dahl-Olsen** | 44 |
| Filip **Djordjevic** | 99 |
| Gutti **Jóhansson** | |

Høvuðsvenjari: **Sigfríður Clementsen**
Hjálparvenjari: **Arnbjørn Hansen**
Liðleiðari: **Ólavur H. Ejdesgaard**
Liðleiðari: **Eyðfinnur Joensen**
Liðleiðari: **Esmar Eiðisgarð**

**INNIHALD**



| | |
|---|---|
| DÓMARI | Petur **Reinert** |
| 1. HJÁLPARDÓMARI | Dan P. **P. Højgaard** |
| 2. HJÁLPARDÓMARI | Petur Páll **W. Hentze** |
| 4. DÓMARI | Kári J. **á Høvdanum** |
| DÓMARAEYGLEIÐARI | Jónfinn **Olsen** |

magn





Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

samskip

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo






# INNIHALD

# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Mikkel **Dahl** (HB) | 5 |
| 2 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 5 |
| 3 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 2 |
| 4 | Magnus **Egilsson** (B36) | 2 |
| 5 | Hans Jákup **J. Lervig** (ÍF) | 2 |
| 6 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 2 |
| 7 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 2 |
| 8 | Daniel **Obbekjær** (07 Vestur) | 1 |
| 9 | Jasper **van der Heyden** (07 Vestur) | 1 |
| 10 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 1 |

WWW.DYSTUR.FO

**SØGUBROT 1**

# Okkurt hissini um Fuglafjarðar bóltfelag

EFTIR: PETUR S. SIMONSEN



*GG! Hetta „søgubrotið" og onnur byggja á egnar upplivingar, tað, sum er mær fortalt og skjøl, sum eg havi fingið ella leitað fram. Viðmerkingar til hetta og onnur „søgubrot" – rættingar, ískoyti, spurningar v.m. – eru hjartaliga vælkomnar. Og er tað onkur sum hevur hugskot til evnir at taka fram í hesum teigi, frætti eg fegin. Somuleiðis frætti eg fegin um myndir, sum siga søguna um ítróttina í Fuglafirði – serliga fótbóltin, hondbóltin, kappróðurin og flogbóltin.*
*Teldupostur: petur.s.simonsen@gmail.com*

**Gestirnir í Fløtugerði í dag eru av Eiði og har nærhendis. Vit kunnu kanska siga, at tað er ikki ein fremmandur fuglur, sum vitjar, tí í meira enn 100 ár hevur fótbólturin knýtt Eiði og Fuglafjørð saman. – Tað sigur søgan, og tað eru vit fleiri sum minnast afturá við gleði.**

Tað er tí kanska ikki so óvæntað, at hetta „samstarvið" millum bygdirnar báðar, er partur av hesum fyrsta søgubrotinum.

ÍF varð stovnað í mars 1946. Men vit vita neyvan heilt vist nær fótbólturin á fyrsta sinni „fór á rull" í bygdini. Helst hevur hetta verið um somu tíð, sum so mangar aðrar staðir kring landið. Tað vil siga fyri meira enn 120 árum síðani. Men fyrstu árini var fótbólturin í bygdini ikki skipaður í einum fótbóltsfelag. Og neyvan var kappast við feløg og aðrar bygdir tey allar fyrstu árini.

## Fuglafjarðar bóltfelag

Tann 9. februar 1938 høvdu, sum tað stendur í einari fundarfrágreiðing, nakrir bóltleikarar kalla saman til fundar í tí gamla skúlanum í Fuglafirði, og varð tá felag stovnað, ið varð nevnt „Fuglafjarðar bóltfelag".

Fundarfrágreiðingin sigur eisini, at Poul Andreas Vørðhamar varð valdur til formann.
Hinir í nevndini vóru:
Daniel P Eliasen, næstformaður
Andrew Hansen, kassameistari
Herluf Berthelsen, skrivari
Martin Jacobsen, nevndarlimur
Ismar Joensen, grannskoðari
Joen Edvard Hansen, grannskoðari

## Fyrsti dysturin á Mølini – 9 móti 9

Um dagarnar stóð grein í miðlunum um Eiðis bóltfelag, sum 24. februar í ár rundaði tey 110 árini. Eiðis bóltfelag er sostatt helst elsta ítróttarfelag í Eysturoynni. Kann leggja aftrat, at GÍ (tá Norðragøtu bóltfelag) stendur til at verða stovnað í 1926 og LÍF (tá Leirvíkar bóltfelag) í 1928.

Í greinini um Eiðis bóltfelag stendur, at fyrsti dysturin á nýgjørda vøllinum á Mølini var í 1916, og at hann var móti fuglfirðingum. – Har verður eisini sagt, at vøllurin var í minna lagi, so avtalað varð, at leikast skuldi við níggju monnum á hvørjum liði.

## Eysturoyarkapping í 1938-39

Hesa tíðina í 20-unum og 30-unum dystast fuglfirðingar, eiðismenn, gøtumenn og leirvíksingar javnan – oftast um heystið og veturin.

Í skjølum frá 1938 lesa vit um kapping millum hesar fýra bygdirnar.
Yvirskriftin er: „Dystirnir um Steypin. Veturin 1938 og várið 1939." (6/11 til 5/2)
Víðari verður sagt, at tveir dystir á skulu spælast á „egnu plenu". Men sambært kappingaryvirlitinum verða tveir dystir leiktir í Fuglafirði og í Gøtu, meðan ein dystur verður leiktur á Eiði og eini í Leirvík.
Í hvussu er, øll leika móti øllum, og í brævi til Fuglafjarðar bóltfelag, dagfest tann 13. februar 1939, verður støðan í kappingini gjørd upp.
Norðragøtu bóltfelag vann kappingina við 5 „point".
Teimum í hølunum koma Fuglafjarðar bóltfelag og Eiðis bóltfelag við 3 „point" hvørt, meðan Leirvíkar bóltfelag onki "point" fekk í hesum umfarinum.

Brævið er undirskrivað av Martin Kruse, Eiðis fótbóltsfelag. Og Martin Kruse endar brævið við orðunum. „Steypið er sent til Gøtu".



*Ivaleyst eru hetta nakrir av garpunum, sum leiktu dystirnar*
*í Eysturoyarkappingunum seinast í 30-unum.*
*Fuglfirðingar hava eitt V á troyggjuni.*
***NB! Frætti fegin frá teimum, sum vita meira at siga um myndina***
***– m.a. bygd, lið, nøvn og ár.***
***Teldupostur: petur.s.simonsen@gmail.com***

**Eysturoyarkapping í 1939-40**
**– flyta dystin vegna streymforhold um neyðugt**

Í brævið, sum Eiðis bóltfelag sendir Fuglafjarðar bóltfelag heystið 1939, skilst, at kappingin, sum var veturin 1938–39, verður endurtikin veturin 1939–40 (5/11 til 2/2). Bara tað, at nú eru tveir dystir á Eiði og í Leirvík og ein dystur í Fuglafirði og í Gøtu.

Í hesum døgum, nú samferðslukervið er so væl útbygt og lívsmynstrið so nógv broytt, er tað kanska áhuga-

vert at festa seg við tvey brot í brævinum frá Eiðis fótbóltsfelag. Har stendur m.a.: „Vit senda hesar reglur av hesi grund, at vit kundu sloppið frá at havt nakran útsending til tykkara í ár, tí vit liggja so avsíðis".
Og víðari stendur: Kampin í Fuglafirði hava vit einki ímóti at flyta vegna streymforhold um tað er neyðugt. Dómaran vilja vit hava av plássinum, har kampurin verður spældur".

Hetta sampakkar væl við tað, sum Herluf Berthelsen sigur í talu í 1980: „Í Fuglafirði varð spælt á Sandinum. Tað var um 1910, at fuglfirðingar fóru at sparka, og fyrsta avbygdalið, teir møttu, var eitt lið av eiðismonnum. Á Sandinum mátti bóltleikurin lagað seg eftir streyminum, tí bert kundi sparkast, tá nógv fjøra var."



Myndin er frá 1956, tá ið fótbóltsvøllurin varð tikin í nýtslu.
Fremst á myndini síggja vit Àsvør og Kornelius av Eiði, síðani Hjalmar.

*Myndin er lænt úr myndasavni, sum Signar á Brúnni hevur savnað.*

## „Plenan" tikin í nýtslu í 1956

Frammanfyri er nevnt, at fuglfirðingar vóru bodnir til fyrsta dystin á nýggju „plenuni" á Mølini á Eiði í 1916. Men fjøruti ár seinni, 11. novembur 1956, vóru tað júst eiðismenn sum vóru bodnir at leika fyrsta dystin móti fuglfirðingum, tá nýggja „plenan" á Trøðni (í Fløtugerði) varð tikin í brúk.

## Vøllurin breiðkaður 1979

Og mín sann um søgan ikki endurtók seg, eftir at vøllurin í Fløtugerði var liðugt breiðkaður í 1979.



*Flaggdagin 25. apríl 1980. Veteranar úr Fuglafirði og av Eiði á veg inn á vøllin í Fløtugerði. Fremst ganga tríggir av stovnarunum av ÍF: Herluf Berthelsen, Sofus Eliasen og Poul Jacob Hansen. Í bakgrundini hómast Lutherus í Tøðuni (Joensen), sum var við til at byggja vøllin.*



*Á myndini síggjast f.v.: Poul Jacob Hansen, Sofus Eliasen, Hjalmar Joensen, Albert Eldevig, Petur Jacob Eliasen, Palli Olsen, Esbern Thomsen, Martin Eliasen, Pól Eliasen, Jógvan Eliasen, Jógvan Thomsen, Hjørleif Petersen, Høgni Jøkladal, Bergur Petersen og Jóhannus Jacobsen.*

Hóast tríggir dystir í 1. deild vóru leiktir á vøllinum við fyribilsloyvi frá FSF heystið 1979 – allir vunnir og avgerandi fyri meistaraheitið hjá ÍF – so varð vøllurin kortini ikki alment handaður og tikin í nýtslu fyrrenn flaggdagin 1980. Og tá vóru tað júst „veteranarnir" av Eiði og úr Fuglafirði sum leiktu fyrstu minuttirnar á nýumvælda og snotiliga vøllinum í Fløtugerði – fleiri teir somu, sum vóru við í 1956.Viðmerking: Í tekstinum omanfyri havi eg endurgivið nøvnini á fótbóltsfeløgunum, soleiðis sum tey eru nevnd í tøku skjølunum.

PS! Søgan um „leikvallirnar" í Fuglafirði verður partur av einum seinni søgubroti.

NÝRÙM

Teknistova

einar@nyrum.fo

tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

**Leiðandi reiðarí**
**í norðurhøvum**




**VARÐIN**
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

**GRANNSKOÐAN**
ROKNSKAPARHJÁLP
**SKATTUR**
VIRKISRÁÐGEVING
**BÓKHALD**
MEIRVIRÐISGJALD



Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO



# INNIHALD

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**